


SKRIVAÐU SØGU

*Ungu spælararnir hjá KÍ skrivaðu søgu, tá teir leygardagin vunnu á Argjum, tí hetta var fyrsti sigurin hjá besta KÍ-liðnum í næstbestu deildini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Søguligur KÍ-sigur

**1. DEILD, MENN** TB kiksaði í Gundadali og FC Hoyvík tapti á heimavølli ímóti vágaliðnum

Hilmar Jan Hansen

Besta KÍ-liðið fór leygarkvøldið av Argjum við 2-0 sigri á AB. Sigurin var søguligur, tí hetta var fyrsta ferðin yvirhøvur, at besta KÍ-liðið vann landskappingardyst í næstbestu deildini.

Ein innanhýsis uppgerð var ímillum tvey av teimum fýra liðunum, sum hava møguleika at flyta upp. FC Hoyvík hevði á niðara vølli í Gundadali vitjan av 07 Vestur. Jón Brekká legði heimaliðið framum í seinna hálvleiki, men 07 Vestur svaraði aftur. Tað eydnaðist bæði at javna og at skora til 2-1, áðrenn FC Hoyvík misti ein spælara. Dómarin vísti Janusi Mortensen av vølli fyri takling, sum varð mett so ógvuslig, at hon var til beinleiðis reytt kort.

Teir í FC Hoyvík vóru ógvuliga vónbrotnir av sær sjálvum. Teir ætla sær at flyta upp í bestu deildina, og teir mettu, at avrikið var nóg gott til, at ið hvussu er eitt stig skuldi komið burturúr.

TB var á ovara vølli í Gundadali, har tvøramenn kendu sviðan av, at HB – serliga tíðliga á árinum – er væl fyri í næstbestu deildini. Her gjørdist talan um tryggan sigur til havnarmenninar, ið einsamallir eru á odda við fullum stigatali.

Uppgerðin í Streymnesi millum EB/Streym og B68 varð vegna jarðarferð á Toftum útsett til mikudagin.

Í triðja umfari verður aftur ein áhugaverd uppgerð á Sevmýri, tá talan verður um dyst millum tvey av teimum, ið fyrr roknaðust millum risarnar í føroyskum fótbólti. Tá fer KÍ at vitja TB.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Aftur finalur næsta ár




FINALUFRÓUR

*Formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen, helt FM-finalurnar hjá kvinnum og monnum geva flogbóltinum mestu umrøðu, hann nakrantíð hevur fingið*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**FLOGBÓLTUR** – Hóast ein ávís ítróttarlig skepsis er viðvíkjandi FM-finalunum, verður hetta leisturin, vit eisini fara at hava næsta kappingarár, sigur formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen

Hilmar Jan Hansen

Bæði hjá kvinnum og monnum var ein roynd gjørd við FM-finalum, eftir at sjálv landskappingin í Eikligunum í flogbólti var av, har tvey tey bestu liðini skuldu spæla finalur um meistaraheitið. Tað liðið, sum var best í trimum finaludystum, gjørdist føroyameistari.

– Hetta riggaði so væl, at flogbólturin sjáldan hevur verið so nógv frammi, sum hann var tað rundan um finaludystirnar, sigur Magnus Tausen, eftir at feløgini á fundi hava umrøtt farna kappingarárið.

– Hóast ein ávís ítróttarlig skepsis er viðvíkjandi FM-finalunum, verður hetta leisturin, vit eisini fara at hava næsta kappingarár. Vit halda, at best er at gera hetta meira enn bara eina ferð, áðrenn vit møguliga broyta nakað.

Eisini hevur verið frammi at geva liðum trý stig, tá tey vinna 3-0 ella 3-1, men at bert tvey stig fyri at vinna 3-2, meðan tapandi liðið tá fær eitt stig. Hóast fólk halda hetta verða eina spennandi roynd at gera, tí tað kann geva javnari kapping, verður hetta ikki aktuelt longu komandi kappingarár.

Annars kann flogbólturin fegnast um metstóra luttøku í kappingunum farna veturin, tí ikki færri enn 151 lið vóru meldað til kappingarnar. Hetta er nógv tað mesta nakrantíð, og til samanberingar kann nevnast, at veturin frammanundan vóru liðini 125 í tali.

– Vit fegnast um stóru framgongdina, og ábendingar um minst líka góða tilmelding komandi kappingarár, sigur Magnus Tausen, sum saman við hinum í Flogbóltssambandinum fyrireikar komandi aðalfundin.

– Møguliga verða kappingarnar hjá teimum 14 ára gomlu broyttar til bólkaspøl við trimum ella fýra liðum, so lið kunnu sleppa undan óneyðuga nógvari ferðing. Eisini er hugsandi, at feløg sleppa at leggja lið saman í ungdómsdeildunum.

**Flogbólturin kann fegnast um metstóra luttøku í kappingunum farna veturin, tí ikki færri enn 151 lið vóru meldað til kappingarnar**

*hilmarjan@sosialurin.fo*